ARBEIÐSEFTIRLITIÐ
*Administration of Occupational Safety and Health*
Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands
Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo

***Skrásetingar nr.:***

**L-E012-3**

# Brúkaraleiðbeining um evni og tilfar

Hendan leiðbeining Arbeiðseftirlitsins sigur frá, hvørjar uppgávur arbeiðsgevari hevur, sum hevur fólk í arbeiði, ið fáast við evni og tilfar. Slík kunnu verða vandamikil og ein meinbogi fyri trygd og heilsu hjá arbeiðsfólkunum (í hesi leiðbeining nevnt vandamikil evni og tilfar).

Hesi evni og tilfar eru:
- Evni og tilfar, sum verða flokkað eftir reglum Arbeiðseftirlitsins.
- Evni og tilfar, sum eru á Arbeiðseftirlitsins lista yvir markvirði fyri evni og tilfar.
- Evni og tilfar, sum verða mett vandamikil eftir reglum Arbeiðseftirlitsins ella lýst við serligari kunngerð.

***Skipað brúkaraleiðbeining.***

Sølumaðurin, sum letur vandamikið evni ella tilfar, skal syrgja fyri, at skillig brúkaraleiðbeining er tøk á føroyskum ella donskum máli.

Arbeiðsgevarin skal skipa fyri brúkaraleiðbeining, sum lokalt er gjørd til júst hansara virki og umstøður tess. Leiðbeining frá sølumanninum kann verða grundarlag fyri henni hjá arbeiðsgevaranum - eitt nú teknisku upplýsingar o.a.

Endamálið við brúkaraleiðbeiningini hjá arbeiðsgevara er m.a. gjørd fyri at arbeiðsfólk skulu fáa vitan um teir vandar, sum kunnu standast av at arbeiða við evni og tilfari, og hvussu ein kann verja seg móti hesum.

Starvsfólkið skal av hesi orsøk fáa brúkaraleiðbeiningina útvegaða og eiga at fáa holla leiðbeining, áðrenn farið verður til verka.

Arbeiðsgevarin hevur ábyrgdina av at brúkaraleiðbeiningin verður gjørd, eins og fyri innihaldið av hesari.

Brúkaraleiðbeiningin verður gjørd í samstarv við trygdarumboð, sum tí eisini eigur at fáa upplýsing um leiðbeiningina hjá sølumanninum.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar frá 25. august 1983.

| ***Útgivið fyrstu ferð:*** | ***Seinastu broytingar:*** |
| --- | --- |
| **13. desember 1988** | |

Arbeiðsgevarin skal fylgja við í teimum broytingum, sum brúkaraleiðbeiningin hjá

sølumanninum upplýsir um. Týdningarmiklar royndir av trygd- og heilsustøðuni, sum verða gjørdar á arbeiðspláss-inum, skulu eisini við í brúkaraleiðbeiningina. Leiðbeiningin hjá sølumanninum og hin frá arbeiðsgevaranum, skulu hava dagfesting og møguliga eisini merktar í talrøð.
Eru virki, sum innflyta ella framleiða vandamikil evni og tilfar til egna nýtslu, skal virkið eisini lata brúkaraleiðbeining.

Tá arbeiðsfólkið hevur fingið holla vitan um brúkaraleiðbeiningina, kann henda t.d. verða tøk nærindis arbeiðsplássinum ella á stað, har arbeiðsfólkið savnast ella hevur atgongd til.

Verður arbeitt við so smáum mongdum av vandamiklum evnum og tilfari, at arbeiðið kann sammetast við tað, sum privatfólk gera, og um hetta bert verður gjørt av og á, kann merkingin á innballingini og brúkaraleiðbeiningin sum sølumaðurin letur, verða nóg mikið.

Hóast tað bert er krav, at brúkaraleiðbeining verður latin teimum, sum arbeiða við vandamiklum evni og tilfari, skal sølumaðurin og arbeiðsgevarin meta um, hvørt onnur evni og tilfar kundu havt gagn av slíkari leiðbeining. Brúkaraleiðbeiningin kundi t.d. verið fyri teimum evnum og tilfari, sum í sjálvum sær eru óskaðilig, men sum undir framleiðslu ella í nýtslu, kunnu gera onnur vandamikil evni.

Um virkið skipar fyri brúkaraleiðbeining fyri øll evni og tilfar sum verða nýtt, fæst samstundis trygd fyri, at hvørt einstakt av hesum eru mett og umhugsað hvørt tað er vandamikið ella at vandamiklar støður kunnu standast av at nýta tey.

Samstundis sum virkið skipar fyri brúkaraleiðbeining, hevði eisini verið gagnligt um skráseting fór fram, við tí fyri eygað, at minka um vandan, og í staðin nýta minni vandamikil evni ella tilfar, har tað er møguligt.

## ***Brúkaraleiðbeiningin*.**

Brúkaraleiðbeiningur skal í høvuðsheitinum snúgva seg um hesar upplýsingar, um til ber - tekniskt og fakligt:

1) Vøruslag og ES-tal (evnisskrásetingartal), sum Arbeiðseftirlitið hevur ásett.
2) Nýtsluøki á virkinum.
3) Avmarkað nýtsluøki á virkinum.
4) Krav um serliga upplæring.
5) Heilsuskaðiligar eginleikar, her eisini sjúkutekin við at fáa í seg og ávirkanina á likamið.
6) Reglur og ráð viðvíkjandi handfaring av evnum ella tilfari, her serliga um arbeiðsklæði og persónliga vernd, eins og møguligt forboð móti at fólk arbeiða einsamøll.
7) Fyrstuhjálp.
8) Eginleikar við upphiting og eldibrandi.
9) Reglur viðvíkjandi eldibrandi.
10) Reglur viðvíkjandi spill og burturkasti.
11) Trygdarforskriftir viðvíkjandi goymslu á virkinum.
12) Merking.

Verður arbeitt við fleiri evnum og tilfari, sum Alíkjast hvørjum øðrum@, og eru eins vandamikil, kann felags brúkaraleiðbeining gerast. Tað kann gerast neyðugt at skipa fleiri leiðbeiningar fyri sama evni ella tilfar, um hesi verða nýtt á ymsan hátt, ymisk støð á virkinum.
Øll tey 12 punktini skulu útfyllast. Verður einki serligt krav sett til tey einstøku punktini, skal tað

greitt viðmerkjast við t.d.:"einki serligt".

Viðvíkjandi Epoxyharpiks og Isocyanater skal viðmerkjast, um tilfar inniheldur epoxyharpiks, einstøk epoxy sambindingarevni, andgjørd loysingarevni ella isocyanater. Turkingartíðin skal viðmerkjast.
Tilfar, sum inniheldur asbestevni, skal verða merkt eftir reglunum og hava ES- skrásetingarnummar, sum Arbeiðseftirlitið útvegar.

**Ùtfyllingarblað 1**

# BRÚKARALEIÐBEINING

(Kunngerð nr. K-E012-2 um evni og tilfar)

*teigi 1*

| | |
|---|---|
| Sølunavn: Vørutal:<br><br>Evnisskrásetingartal: | |

*teigi 2*

| | |
|---|---|
| Sølumaður:<br><br>Tlf.: Viðtalupersónur: | |

*teigi 3*

Frágreiðing um vøru og nýtslu:

*teigi 4*

| | |
|---|---|
| Ì staðin fyri (áður dagfest): | Sett saman:<br><br>*Dagfest* *Undirskrift* |

***Viðmerking til útfyllingarblað 1*.**

Teigi 1: Upplýsingarnar hjá sølumanninum verða endurgivnar. Eisini heiti, sum bert virkið nýtir, umframt aðrar merkingar.

Teigi 2: Upplýsingarnar hjá sølumanninum verða endurgivnar.

Teigi 3: Upplýsingarnar hjá sølumanninum verða endurgivnar, við uppískoyti frá møguligum viðmerkingunum hjá virkinum.

Teigi 4: Hesir upplýsingarnar mugu ikki verða ósambæriligir við hin partin av útfyllingarblaðnum. Ávís orð, eitt nú "eiturfrí", "umhvørvisvinarligt" og "óskaðiligt", mugu ikki nýtast.

**Ùtfyllingarblað 2**

*teigi 1*

| | |
|---|---|
| Sølunavn:<br>Evnisskrásetingartal: | |

*teigi 2*

| | |
|---|---|
| Nýtsluøki:<br>Avmarkað nýtsla:<br>Ikki loyvt at nýta:<br>Ikki loyvt at nýta saman við:<br>Ikki loyvt at nýta til: | |

*teigi 3*

Krav um serliga upplæring:

*teigi 4*

Forskriftir viðvíkjandi nýtslu:

*teigi 5*

Heilsuskaðiligir eginleikar (ávirkan eftir styttri ella longri tíðarskeið):

At anda í seg:

Hold:

Eygu:

Eta ella drekka:

***Viðmerkingar til útfyllingarblað 2.***

Teigi 1: Endurtøka frá síðu 1.

Teigi 2: Her verður viðmerkt, t.d. um evnið bert verður nýtt til arbeiði XXX á virkinum.

Avmarkað nýtsluøki, sum brúkaraleiðbeiningin frá sølumanninum upplýsir um, skal eisini fáa innivist á leiðbeiningini hjá virkinum.

Dømi: Bert loyvt teimum persónum at nýta, sum hava fingið skrivlig loyvi frá virkinum. Ikki loyvt at nýta saman við vøru YYY.
Ikki loyvt at nýta saman við maskinu ZZZ

Teigi 3: Her skal viðmerkjast møgulig lógarkrøv, sum sølumaðurin hevur upplýst og møguliga eisini krøv, sum virkið setur.
Dømi: Skal bert útflýggjast persónum sum hava fingið leiðbeining á virkinum um XXX.

Teigi 4: Upplýsingar í brúkaraleiðbeiningini hjá sølumanninum, skulu eisini fáa innivist á leiðbeiningini hjá virkinum. Arbeiðsgevarin skal vísa á fyriskipan um nýtslu, eins og hvørjar reglur eru til taks, um evnið skal flytast á virkinum. Sølumaðurin hevur upplýst um hóskandi persónlig verndarútgerð. Arbeiðsgevarin skal greiða frá, persónligu verndarútgerðini, sum skal nýtast í ávísu arbeiðsstøðuni (góðsku og slag) og hvar á virkinum, henda er at fáa. Verið ansin, tí tað kann verða neyðugt at tryggja móti øðrum evnum, t.d. klovingsevnum í samband við upphiting.

Teigi 5: Brúkaraleiðbeiningin sum sølumaðurin letur skal endurgevast.

*teigi 1* **Ùtfyllingarblað 3**

Fyrstuhjálp:

Eygu:

Hold:

Anda í seg:

Brúnasár:

*teigi 2*

Eginleikar við upphiting og eldibrandi:

Fyriskipanir í samband við eldibrand
(her eisini hóskandi eldsløkkingarevni)

*teigi 3*

Fyriskipanir viðvíkjandi spill og burturkast:

Evniskort fyri burturkast nr: Evniskort fyri burturkastbólk:

*teigi 4*

Trygdarforskriftir viðvíkjandi goymslu:

*teigi 5*

Merking (lima møguliga navnaseðil á) Tekin

V-setningur ❑

T-setningur ❑

MAL lyklatal ❑ ❑ ❑

***Viðmerkingar til útfyllingarblað 3.***

Teigi 1: Brúkaraleiðbeiningin endurgevur ávísingarnar um fyrstuhjálp, sum sølumaðurin letur. Eisini skal upplýsast hvar fyrstuhjálpútgerðin er. Møguligt tlf. har hjálp kann boðsendast, verður eisini víst til her.

Brúkaraleiðbeiningin skal endurgeva leiðbeiningina, sum sølumaðurin letur.

Teigi 2: Víst verður til, hvar eldsløkkiútgerðin er støðað.
Upplýsingar frá sølumanninum um hvørji eldsløkkingarevni kunnu fáa eldin at nørast, eins og leiðbeining um hvørji evni skulu nýtast í hesum føri, skulu endurgevast.

Teigi 3: Brúkaraleiðbeiningin skal endurgeva leiðbeiningina frá sølumanninum og skal eisini upplýsa um, hvar hjálpievni v.m. eru tøk og hvar burturkastið skal latast.

Leiðbeiningin hjá sølumanninum skal endurgevast.

Teigi 4: Leiðbeiningin frá sølumanninum um serlig krøv viðvíkjandi hitastig, vætuinnihald, goymslu, sundurskilað frá øðrum tilfari o.s.fr. skal ávísast.
Goymsluøki skal upplýsast.

Teigi 5: Leiðbeiningin frá sølumanninum skal endurgevast.

*teigi 1*

**Ùtfyllingarblað 4**

| | |
|---|---|
| Innballing:<br>Stødd:<br>Skap: Tilfar: | |

*teigi 2*

| |
|---|
| Samanseting (eindir, CAS-tal, sambært galdandi reglur fyri markvirði): |

*teigi 3*

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Alisfrøðiligu/evnafrøðiligu eginleikarnar: | | | | |
| Standur: | | Upploysist í vatni: | | |
| Litur: | | pH: | | |
| Luktur: | | Hópfylla: | | $^{o}C$ |
| Luktmark: | ppm | Logpunkt: | | $^{o}C$ |
| Bræðingarmark: | oC | Ífestingarhiti: | | $^{o}C$ |
| Kókimark: | oC | Spreingimark: | % | % |
| Damptrýst ($^{o}C$): | Pa | Annað: | | |

*teigi 4*

| |
|---|
| Onnur mynduleikakrøv (koyring v.m.): |

*teigi 5*

| |
|---|
| Uppískoyti til aðrar upplýsingar: |

***Viðmerkingar til útfyllingarblað 4.***

Teigi 1: Brúkaraleiðbeiningin frá sølumanninum verður endurgivin.

Teigi 2: Har umstoyting, innballing v.m. fer fram, skal arbeiðsgevarin upplýsa um krøv til innballingarevni, her eisini um innballing er, sum ikki eigur at verða nýtt.

Teigi 3: Brúkaraleiðbeiningin hjá sølumanninum verður endurgivin. Har eingin upplýsingur er tøkur, skal frámerki gerast.

Teigi 4: Tað kan t.d. snúgva seg um eldfimar bólkar eftir lógarinnar krøvum og loyvda stødd av evni, koyrireglur á landi, á sjónum og í lofti.

Teigi 5: Her er rúmd fyri uppískoyti til upplýsingar sum hava týdning fyri lækna, um óhapp ella vanlukkur standast. Umframt hetta kunnu nærri upplýsingar gevast um møguliga skaðaútgerð.

**Arbeiðseftirlitið**, 13 desember 1988

Eli Davidsen, stjóri (sign.)